Góðu foreldur at næmingum í 5.a.
Í dag hava næmingarnir fingið eitt samrøðuskjal við heim, sum tey skulu útfylla saman við tykkum foreldrum heima. Har eru spurningar um trivnað í skúla, frítíð og heima, um kost, svøvn, rørslu osv. Hetta er eitt gott høvi hjá tykkum at sita saman við tykkara barnið og fáa eitt gott prát um, hvussu tey trívast og um góðar vanar. Tey skulu hava pappíri við í skúla komandi mikudag, 25.nov.
Komandi mikudag komi eg eisini at tosa við tey í bólkum um evnið kynsbúning, um kropsligar og kensluligar broytingar.
Út frá samrøðuskjalinum fari eg at hava einstaklingasamrøður við børnini. Eisini verður sjón, hædd og vekt kannað.
Um tit foreldur ynskja eitt prát viðvíkjandi heilsu, trivnað ella menning hjá barni tykkara áðrenn samrøðurnar, eru tit vælkomin at seta tykkum í samband við meg.
Vinaliga,
Morid Meitilberg,
Heilsufrøðingur í Runavíkar kommunuskúla.
Tel: 562339
Mail: moridm@gigni.fo